## 30 mia. til sjúkrahús

Myndugleikarnir í Keypmannahavn ætla sær at brúka 30 milliardir krónur til sjúkrahúsini í økinum tey næstu 12 árini. Ein partur av pengunum skal brúkast til nýgerð, sum verður tilsamans 275.000 fermetrar, harav 80.000 fermetrar verða nýgerð á Ríkissjúkrahúsinum. Hinir pengarnir skulu so brúkast til nútímansgerð og ábøtur á sjúkrahúsunum í Hvidovre, Herlev, Hillerød, Glostrup, Bispebjerg, Frederikssund, Amager og Bornholm. Undan avgerðini hjá teimum lokalu myndugleikunum í høvuðsstaðnum hevur danska stjórnin sagt, at hon ætlar sær at brúka 40 milliardir krónur til sjúkrahúsini kring landið tey næstu árini.



## Skjálvtar við Grímsey

Fyrrakvøldið og gjáranáttina vóru fleiri veikir jarðskjálvtar við íslendsku oynna Grímsey, sum er norðan fyri Ísland. Jarðfrøðistovnurin í Reykjavík sigur, at fyrrakvøldið var ein skjálvti, sum var 2,0 á Richter-stiganum, góðar tveir fjórðingar eystan fyri oynna. Gjáramorgunin var aftur ein skjálvti. Hann var 3,0 á Richter og var einar níggju fjórðingar í landssynning úr Grímsey. Jarðfrøðingurin Sigþrúður Ármannsdóttur sigur við Vísir, at slíkir veikir jarðskjálvtar eru rættiliga vanligir á leiðini sunnan fyri Grímsey.

# Meksiko er ein spøkilsisbýur



**Ein vanligan dag tekur tað hálvanannan tíma hjá 24 ára gamla Sverra í Sandagerði at koyra til sentrum á Meksiko Býi. Soleiðis er ikki í dag. Síðan svínakrím breyt út er alt stongt og gøturnar á heimsins triðstørsta býi standa tómar. - Her er ein dapur og nervøsur stemningur, sigur Sverri, ið býr í útjaðaranum á Meksiko Býi**

SVÍNAKRÍM
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Heimsins triðstørsti býur, Meksiko Býur, líkist mest einum spøkilsisbýi í dag. 20 milliónir fólk búgva í og kring Meksiko Bý, men gøturnar eru tómar. Øll almenn støð í Meksiko Býi eru stongd, og bert vápnaðir hermenn halda vakt við sjúkrahúsini. Orsøkin er útbrotið av deyðiligu farsóttini svínakrím, ið hevur sín uppruna og ger mest um seg í Meksiko.

24 ára gamli Sverri í Sandagerði úr Havn er staddur í útjaðaranum á Meksiko Býi, í Atizapan, sum er hálvanannan tíma frá sentrum á Meksiko Býi, har hann býr saman við unnustu sínari Sandra Maria.

Síðani fyrst í mars hevur Sverri gingið á málskúla har, men ætlar sær at lesa víðari á universiteti eftir summarfrítíðina. Hann greiðir soleiðis frá støðuni.

- Hetta er nokkso dramatiskt. Sum er nú, so eru vit bara heima. Skúlarnir eru stongdir og so at siga alt landið er í karantenu. Gøturnar úti eru tómar, tí alt er stongt. Vanliga so tekur tað hálvanannan tíma at koyra inn til býin, men nú hevði tað helst bara tikið hálvan tíma, tí eingir bilar eru á vegunum, greiðir Sverri frá.

### Púra óveruligt

Í gjár boðaði meksikanska stjórnin frá, at okkurt um 35.000 almenn støð í Meksiko Býi vóru stongd. Umframt at hava biðið matstøð um bert at servera take-away máltíðir, hava myndugleikarnir kravt at barrir, klubbar, biografar, leikhús, venjnga- og ítróttahøli og samkomuhallir stongd til 6. mai.

- Her er næstan alt stongt. Bert onkur matvøruhandil er opin. Hetta er nokkso óveruligt. Um tú fer útum, so ganga fólk í maskum. Men vit vilja ikki fara út. Staturin her mælir øllum til at vera heima, soleiðis at sjúkan ikki breiðir seg, og vit hava verið inni í nakrar dagar, kanska farin líka út um dyrnar, og so innaftur, sigur Sverri í Sandagerði.



Var tað ikki nóg dramatiskt við svínakrími, so bleiv tað uppaftur verri mánadagin, tá ein jarðskjálvti á 5,6 ár Richterstiganum rakti